# Missión og diakoni - meðan breyðini ganga!

**-Vit eru sum kristin kallað í tænastu teimum til hjálpar, íð hava ein likamligan ella sálarligan tørv. Kristnin er kallað í arbeiðsklæði til tess at prædika og gera miskunnarverk. Kirkjan hevur eina dupulta dagsskrá, t.e. missión og diakoni segði Jógvan Fríðriksson m.a. í prædiku síni í Skála kirkju, tá Fjarðastevnan varð hildin herfyri. Vit prenta prædikuna**

*Skála kirkja 7. s. e. trinitatis*
*1. tr. : Markus 8,1-9.*

Ein løgin kensla bylgist mær barmi í, nú kirkjan í tímanum undan døgurða vitjar hvørt húski og sigur frá einum matundurið. Tað sá annars ikki væl út fyri nøkrum døgum síðani. Løgið tyktist tað mær at skula tosa um mat á einum prædikastóli, meðan fleiri eldri og førleikaskerd møguliga mistu játtanina til døgurðan. Hugsanin vitjaði, at vit sum fólkakirkja við øllum okkara føgru orðum við dagsins prædiku kundu missa trúvirðið. Tíbetur varð ein loysn funnin á hesum trupulleika, men best var, um vit ongantíð vóru komin í hesa støðuna.

Fyri nøgvum árum síðani, í sekstiárunum í undanfarnu øld, orðaði hin kendi týski guðfrøðingurin Dorothee Sølle henda setningin "deyðin av breyði eina". Dorothee Sølle var andaliga kveikt av frælsisguðfrøðini, og hon royndi at vísa á tey bleytu virðini í eini tíð, har vápnini og tey køldu virðini sum jarn og betong settu dagsskránna. Menniskjan doyr av breyði eina er ein væl troffin útsøgn. Tað skal meira til lív og trivnað enn breyð. Breyðið er ein fortreyt fyri lívinum, men tað er ikki nóg mikið í sjálvum sær. Til trivnað og vælveru krevst, at menniskjan hevur nakað av liva av og nakað at liva fyri. Talan er um eina andaliga dimensión, og fyri Dorothee Sølle er tað týdningarmikið, at hin kristna trúgvin, trúgvin á Jesus, sæst aftur og fær fylgir í tí borgarliga og politiska lívinum.

Dorothee Sølle hevur skrivað hópin av bókum, og vit megna ikki í eini prædiku at lýsa hugsan hennara. Tað mesta av tí, hon hevur sagt, kveikir hugans virki, sjálvt um nakað tykist fremmant. Tað avgerandi er ikki, um tikið kann vera undir við øllum ein guðfrøðingur sigur. Tað avgerandi er at duga kynstrið at lurta og lata seg kveikja, so ein sjálvur kann koma til eina greiða fatan og niðurstøðu.

Útsøgnin hjá Dorothe Sølle "um deyðan av breyði eina" hóskar væl inn í okkara heimligu samfelagsstøðu. Tað er valla rætt, at vit sum samfelag hugsa í gróthørðum virðum og gloyma tey veikaru í samfelagnum. Tað haltar í tí samfelagsligu raðfestingini, tá tey gomlu, sjúku og menningartarnaðu vegna tvørrandi fíggjarjáttan ikki fáa ta røkt og tey tilboð, sum vit annars við fakligum førleika kunnu røkka.

Vit mega varnast týdningin av teim bleytu virð-unum. Til trivnað, vælveru og lívsins uppihald er tað ikki nóg mikið at hoyra tíðindini um vegagerð, tunlar og flogvøll. Tað er lívsneyðugt at lívga andan, sál og sinnið. Vit mega hava eitt viðkomandi sosialt medvit.

Eitt vælvirkandi samfelag eigur at geva tí yngra ættarliðnum gætur, so tey hava atgongd til hollan skúla og yrkismenning. Ungdómurin fær eisni gott í beinini av kveikjandi og mennandi frítíðarvirksemi. Eitt vælvirkandi samfelag eigur harafturat at hava ein hollan eldrapolitik. Tað er allneyðugt, at dyrnar hjá teim gomlu, íð búgva heima, verða opnaðar, og eitt livandi fólk sum likamligur andi ber døgurðan á gátt. "Góðan dag. Nú koma vit við døgurðanum. Vit ynskja tygum ein góðan dag, at tygum mega njóta matin."

Tað snýr seg um mat á borðið, og kirkjan eigur ikki einvíst at tala inn í ella út í samfelagið. Hin kristna kirkjan hevur ábyrgd og livir ikki í eini friðhalgaðari sonu, har lívsins viðurskifti verða mett óviðkomandi. Tað vit vanliga kalla guðsdýrkan t.d. prædika, lovsangur og bøn er bara ein partur av virksemi teirra kristnu. Vit eru sum kristin kalla í tænastu teimum til hjálpar, íð hava ein likamligan ella sálarligan tørv. Kristnin er kallað í arbeiðsklæði til tess at prædika og gera miskunnarverk. Kirkjan hevur eina dupulta dagsskrá, t.e. missión og diakoni.

Í hesum verki er Jesus teim kristnu ein fyrimynd. Í allar mátar er Jesus væl meiri enn alt annað. Hugtikin av Jesusi prísa vit Guðs



*Jógvan Fríðriksson, prestur nam í prædiku síni herfyri við eitt sera nøgv umrøtt mál í samfelagnum, matur til tey eldru*

navni, at hann so sjónliga hevur opinberað sín kærleika. Tess størri rúmd hin stilla løtan í kvirru og djúphugsni fær í okkara guðstrúgv, tess glaðari verður trúgvin, tess hvøllari ljóðar lovsangurin til Guðs heiður og tess heitari slær hjartað, tá vit síggja medmenniskjað í neyð og svárari støðu.

Ein kristin kirkja er í síni allýsing missionerandi. Hin upprisni Jesus hevur givið tey væl kendu dóps- og missiónsboðini : "Mær er fingið alt valdið í himli og á jørð. Farið tí og gerið øll fólkasløgini til lærusveinar mínar, við tað at tit doypa tey til navns faðirsins og sonarins og hins heilaga anda, og við tað at tit læra tey at halda alt tað, íð eg havi boðið tykkum. Og sí, eg eri við tykkum allar dagar alt til veraldar enda." (Matt. 28,18-20)

At prædika evangeliið um Jesus er uppgáva teirra kristnu. Til hetta eru skipaðar tænastur. Í kirkjuni hava vit prestarnar, sum á ein serligan hátt eru kallaðir sum hirðar og umsjónarmenn kirkjuliðsins. Prestarnir eru andaligir leiðara, og teirra fremsta uppgáva er at prædika evangeliið, umsita sakramentini og fremja kirkjuligar gerðir, t.d. sálarrøkt. Afturat prestunum kunnu vit nevna tænasturnar sum deknur, urguleikari og klokkari. Kirkjutænararnir gera eina drúgva og trúgva tænastu í orðisins boðan.

Eisini leikfólkið hevur eina virkna uppgávu í hesum prædikandi verki bæði í og uttan fyri kirkjubygningin. Hugsa vit um fólkakirkjuna kunnu vit nevna Heimamissiónina, Kirkjuliga Missiónsfelagið, karismatikara og aðrar bólkar. Hetta virksemið í missiónsog meinigheitshúsum hevur verið mongum til signingar. Alt er týdningarmið, men serliga er at frøast um barna- og ungdómsarbeiðið. Sunnudagsskúlin er eitt vælsignilsi og gevur børnunum eina andaliga barlast, og júst í hesum døgum eru summarlegurnar. Tað er ríkidømið í sjálvum sær, at Jesu navn verður nevnt fyri børnum og vaksnum í tí heimliga og í tí almenna rúminum.

Hugsa vit um tann verkliga partin av kristnu trúnni er myndin ein onnur. Vit hava nógv tænandi fólk, sum sjálvboðin gera ein góðan gerning. Vit kunnu nevna tænastufólk í kirkjuligum høpi, t.d. reingerð, køksarbeiði og annað handverk. Hugtakandi er at síggja nakrar eldsálir í millumtjóða hjálpararbeiði. Nøkur virka í tí heimliga og savna inn klæðir og heiligvág, meðan onnur vitja fátæk støð úti í heimi. Harrin signi hvønn og ein í sínum gerningi.

Men hugsa vit um fólkakirkjuna, so er tað undrunarvert, at vit ikki hava kallað fólk í tænastu sum diakonar. Skriftin umtalar hesa tænastu við stórum orðum. Hin fyrsti kristni píslavátturin, Stefanus, var diakonur. Stefanus virkaði fyri Harran, tá hann í tí elstu kristnu kirkjuni gjørdi tænastu við borðini.

At virka fyri Harran er meira enn orðsins tænasta. Andans kraft er sterk, og bæði í orðsins og verkligari tænastu mega vit lata okkum fylla við anda Guðs. Meðan Stefan var steinaður til deyða, bað hann fyri atsóknamonnunum : "Harri Jesus, tak tú ímóti anda mínum!" Og hann fell á knæ og rópaði við harðari rødd : "Rokna teimum ikki hesa synd uppí!" Og í tí hann hetta segði, sovnaði hann burtur." (Aps. 7,59-60)

Nakað av hesi sjón er teim kristnu gagnlig, at vit duga at síggja, at hvør Harrans tænari hevur óendaliga høgt virði, tí allar orðsins tænastur og hvør handalig tænasta er stórbær. Í Harrans víngarði er eingin lítil tænasta. Øll verk útinnt í Jesu navni eru stórar tænastur.

Tann missiónerandi kirkjan er kallað í tænastu, og vit mega sum kristin hava dirvi at ganga inn í tað almenna rúmið. Tað er mikið lættari at halda seg innanveggja í eini kirkju. Men vit eru sum kirkja kallað at bera evangeliið út til fólkið og heimsnins fólkasløg. Farið út í allan heimin, segði Jesus, og vit hava lyndi at fara inn og lata dyrnar aftur eftir okkum.

Jesus ræddist ikki tað almenna rúmið. Í dagsins prædiku er hann staddur á heidnamanna jørð eystan fyri Galileavatnið. Her í tí fremmanda var stór mannamúgva komin saman. Jesus talaði lívsins orð og gjørdi miskunnarverk. Ein deyvur varð grøddur, so oyru hansara opnaðust, og tungan talaði ræðið. Fólkamongdin prísaði Jesusi fyri undurverkið og segði ovfarin av bilsni: "Alt hevur hann gjørt væl, eisini deyv letur hann hoyra og málleys tala." (Mrk. 7,37)

Her í tí fremmanda varnast Jesus, at mannamúgvan hevur einki at eta. Ein áhugaverd útsøgn um Jesus, at hann gevur tí tímiliga gætur. Hann ikki bara varnast trupuleikan, men tekur sjálvur stig til at metta fólkið. Jesus rópar lærusveinar sínar til sín og sigur: "Mær tykir hjartaliga synd í hesi mannamúgvu, tí at í tríggjar dagar hava tey nú dvølt hjá mær, og einki hava tey at eta. Og lati eg tey fara fastandi avstað heim til sín, tá munnu tey fáa maktarloysi á veginum, og summi av teimum eru komin langan veg."

Soleiðis er Jesus, hann hevur umsorgan bæði fyri likami, sál og anda. Ein rík útsøgn um son Guðs, frelsara heimsins, at hann tók hjartaliga synd í mannamúgvuni, tí tey einki høvdu at eta. Umsorgan og kærleiki, soleiðis kenna vit Guð, tá hann gav heiminum einborna son sín sum frelsara. Umsorgan og kærleiki, soleiðis kenna vit Jesu sinnalag. Kærleikin er markleysur, hann er ikki stað- og tíðarbundin. Kærleiki Guðs fevnir tað trygga og kenda líkasovæl sum tað fremmanda økið, har trúgvin hevur annað innihald enn Ísraels Guð.

Lærusveinar Jesu hildu, at uppgávan var møtimikil. "Hvaðani skal nakar her í oyðimørkini kunna metta hesi við breyði?"

Hetta máttloysið vitjar viðhvørt Harrans tænara, og vit hava lyndi at stara okkum blind í uppgávuni. Ístaðin fyri at stara okkum blind í uppgávuni, eiga vit at hyggja uppá á Jesus, íð hevur kallað okkum í tænastu. Tað ómøguliga verður tá mangan møguligt, tí Jesus er sum lívsins Harri svarið til heimsins neyð.

Sjey breyð vórðu brotin og vælsignað av Jesusi. Skarin settist niður á jørðina og át seg mettan. Ein rík løta saman við Jesusi. Lærusveinarnir hentaðu upp í sjey tægur av molum, íð vórðu til avlops.

Við atliti at missión og diakoni vella fram nógvir spurningar. Hvar og millum hvørji ynski eg at prædika Kristus? Havi eg dirvi at virka for Kristus í tí fremmanda á einum øki, sum eg sjálvur meti er fremmant fyri Kristusi? Fær Kristus loyvi at kalla meg í sína tænastu, ella seti eg sjálvur skránna fyri mínum virksemi.

Við atliti at tænastuni er vert at minnast orð Jesu, at tað er vandamikið at velja tey frá, íð tykjast óverdug. Tí Harrin Guð "letur sól sína rísa fyri illum og góðum og letur regna niður yvir rættvís og órættvís." (Matt. 5,45) Amen.